# Eysturoyartunnilin

## Fyrsta tilmæli um ein leist fyri Eysturoyartunnilin

## Partur 1

**Arbeiðsbólkur**
Róaldur Jákupsson
Tórir Michelsen
Hans Albert Hansen

**Stýrisbólkur**
Rúni Joensen
Kaj Johannesen
Bjarni Askham Bjarnason
Bjørgfríð Ludvig
Pól Edvard Egholm
Petur Petersen
Marjun Hanusardóttir
Ewald Kjølbro

**09-09-2013**

# Innihald

Inngangur ... 2
Samandráttur, niðurstøður og tilmæli ... 2
Fíggingarhættir ... 3
Arbeiðssetningur ... 3
Lýsing av verkætlanini ... 3
Arbeiðssetningur ... 4
Endamál, avmarkingar og leisturin víðari ... 4
Metoda ... 4
Yvirskipaðar fortreytir ... 5
Ferðslutøl ... 5
Prísir og prísáseting ... 6
Rakstrarkostnaður ... 6
Stutt um váðan í verkætlanini ... 6
Rentur ... 7
Kredittvirðið hjá landinum ... 7
Samfelagsnytta ... 8
Fíggingarhættir ... 8
Útrokningar ... 8
Almennur tunnil ... 8
Úrslit ... 9
Alment partafelag ... 9
Úrslit ... 9
Alment, privat, samstarv (APS) ... 10
Privat verkætlan ... 11
Keldulisti ... 12
Viðheft skjøl ... 13
Fíggingarhættir ... 13

# Inngangur

Fylgjandi upprit er skipað í tveir partar. Fyrri partur hevur til endamáls at geva eitt yvirlit yvir ymsar hættir at skipa tunnilsverkætlanina millum Streymoynna og Eysturoynna – hereftir kallað Eysturoyartunnilin. Hugt verður eftir og greinað, hvørjir fyrimunir og vansar eru við ymsu leistunum, og hvørja ávirkan teir hava á ymisk útvald atlit. Teir verða settir upp ímóti hvørjum øðrum við tí endamáli at kunna velja út, hvørjir leistar eru til størst gagn fyri føroyska samfelagið, fyri síðani at granska og greina møguleikar í tveimum útvaldum leistum í 2. parti av uppritinum.

# Samandráttur, niðurstøður og tilmæli

Út frá arbeiðssetninginum og teimum fortreytum, ið settar eru, mælir bólkurin í fyrsta lagi til, at Eysturoyartunnilin verður lagdur í eitt slag av almennum partafelagi, sum vit kenna aftur frá hinum báðum undirsjóvartunlunum. Valið er grundað á, at hetta er ein leistur, ið er kendur frammanundan. Vit meta, at tilber at fremja hetta í verki uttan at ávirka kredittvirðið hjá landinum stórvegis, um rætt verður farið fram.

Hesin lesturin livir best upp til aðrar fortreytir, ið eru rættvísi, líkaregla og gjøgnumskygni. Til ber at minka um ávirkanina á kredittvirðið á fleiri hættir. T.d. við at áseta ein tíðaravmarkaðan skatt, ið minnir um heilsutrygdargjald, ella við øðrum skatta- og avgjaldskeldum. T.d. oljuavgjald, vektgjald ella at økja um trygdina við at seta part av ognini í hinum tunlunum inn sum apportinnskot, ella at seta alla ognina inn sum apportinnskot. Hóast samfelagsnyttan við at gera tunnilin almennan burturav, t.v.s yvir fíggjalógina,er størst, so halda vit ikki, at hesin fyrimunurin vigar upp fyri teimum vansum, ið eru knýttir at. Eisini er samfelagsnyttan bert eitt vet hægri. Tapið, ið brúkarin fær sammett við einum almennum partafelagi, er einans 198 mió. kr. yvir eitt 30 ára tíðarskeið. Tapið fyri brúkaran er nógv størri í eini privatari verkætlan óansæð privata rentukostnaðin (uml. 3,5 mia. kr.) – tí hann vil optimera eftir hægst umsetningi – og tí er hendan loysnin vald frá.

| | Alment | Alment partafelag | APS | Privat |
|---|---|---|---|---|
| **Byggikostnaður** | 1,2 mia. | 1,2 mia. | 1,2 mia. | 1,2 mia. |
| **Lánsrenta** | 3,5% | 4,5% | 4,5 til 5% | 5% |
| **Prísur persónbil n/s** | 32 kr. | 34,25 kr. | 34,25 til 100 kr. | 100 kr. |
| **Meirkostnaður fyri brúkara** | 0 kr. | 2,25 kr. | 2,25 til 68 kr. | 68 kr. |
| **Samfelagsnytta** | 1,7 mia. ++ | 1,7 mia. + | 1,7 til 1,4 mia. | 1,4 mia. |
| **Brúkara tap** | 0 kr. | 198 mió. | 198 mió. til 3,5 mia. | 3,5 mia. |
| **Meting av atlitum** | | | | |
| Samfelagsnytta | +++ | ++ | + (?) | + |
| Rættvísi | - | + | + | - |
| Líkaregla | - | + | - | - |
| Kredittávirkan | - | (-) | (-) | |
| Gjøgnumskygni | - | + | + | - |

*G.G. At rentan fyri privat felag er lægri enn í øðrum útrokningum, stavar frá, at hugt verður nú bert eftir rentuni fyri fremmandan kapital, tí rentingin av eginognini er óviðkomandi í hesum útrokningarháttinum.*

Í øðrum lagi mælir bólkurin til ein APS-leist. Hetta tilmælið er neyvt tengt at avtaluni og bindingunum, ið settar verða – t.d. í prísi og renting av egin- og fremmandakapitali. Ein APS-verkætlan kann skipast soleiðis, at hon í stóran mun líkist einum almennum partafelagi, og tá er hon áhugaverd at granska nærri.

Samanumtikið verður mælt til, at arbeitt verður víðari við leistunum almennum partafelagi og almennum-privatum samstarvi (APS). Eitt, sum eigur at verða umhugsað fyri at minka íløguna og um váðan í verkætlanini, er at broyta linjuføringina til at fevna um tunnil millum Strendur og Sund, umframt brúgv um Skálafjørðin. Samfelagsnyttan verður tá størri, tí tað til ber at ganga og súkkla um eina brúgv, sparda tíðin er minni í tunlinum, trygdin er betri á eini brúgv, umframt at viðlíkahaldskostnaðurin er lægri. Harafturat er byggikostnaðurin umleið 200 mió. kr. lægri.

Sostatt ber til at minka munandi um samlaða váðan í verkætlanini við at broyta linjuføringina til at fevna um eina brúgvaloysn. Ein brúgvaloysn kann verða framd uttan at ávirka skipaferðsluna á Skálafjørðinum stórvegis. Hetta er tó ein loysn, sum fyrr hevur víst seg ikki at hava serliga góða undirtøku millum politikarar og borgarar í lokaløkinum kring Skálafjørðin.

Verður leisturin at savna allar undirsjóvartunlarnar í einum almennum tunnilsfelag valdur (t.d. við apportinnskoti av hinum tunlunum), verður neyðugt at fáa fólksliga undirtøku fyri hesum. Hetta kann møguliga gerast við lyfti um, at nýtslugjøldini í Vága- og Norðoyatunlunum lækka, soleiðis at tey júst rinda fyri rentur, umsiting, rakstur, viðlíkahald og avseting til enduríløgu. Í hesum sambandi skal verða viðmerkt, at virðismetingin á Vága- og Norðoyatunlinum er neyvt knýtt at, hvussu prísásetingin á nýtslugjaldinum verður frameftir. Báðir tunlarnir hava rindað avdráttir aftur skjótari, enn eftir upprunaætlanini, og til ber uttan iva hjá einum almennum tunnilsfelagi at fáa avdráttarskáa í lánsgjøldini.

## Fíggingarhættir

Inntøkurnar til at afturgjalda lántøkuna av íløguni meta vit í høvuðsheitum kunnu koma frá fýra inntøkukeldum. Hesar eru:

- Nýtslugjald (brúkaragjald)
- Vegskattur
- Brennievnisavgjald
- Vanligur skattur yvir fíggjarlógina

Fyri at halda líkaregluna og við atliti at rættvískensluni, verður mælt til, at nýtslugjald verður brúkt og minkað í mun til minkandi rentu- og avdráttarútgjøld. Á sama hátt sum vit kenna tað í dag frá hinum undirsjóvartunlunum. Hugsast kann, at tá tunnilin er niðurgoldin, verður gjaldið tað sama í øllum undirsjóvartunlunum. Tó soleiðis at rakstur, viðlíkahald og hóskandi avseting til enduríløgur verður goldið av brúkarunum.

## Arbeiðssetningur

### Lýsing av verkætlanini

Talan er um eina sera lønandi íløgu fyri samfelagið sæð frá kost-nyttu sjónarmiðum, *hóast* varisligar metingar verða brúktar, og *hóast* hædd verður tikin fyri váðanum í verkætlanini. Verkætlanin er

sambært øllum ferðslukanningum væl før fyri at fíggja seg sjálva við brúkaragjøldum. Samfelagsnyttan stavar serliga frá spardari tíð, spardum brennievni og minni sliti á bilar. Verkætlanin ber seg somikið væl, at hon kann gerast ein møgulig inntøkukelda hjá tí almenna í framtíðini, um ein ynskir tað, og kann vera við til at fíggja viðlíkahald og framhaldandi menning av undirstøðukervinum.

## Arbeiðssetningur

Finnast skal fram til skilabestu loysnina fyri føroyska samfelagið, t.e. tann loysnin, ið hevur við sær størstu samfelagsnyttuna. Eitt tilmæli frá einum arbeiðsbólki skal verða skrivað, har fleiri skipanar- og fíggingarhættir verða lýstir. Skipanarhættirnir fyri ein Eysturoyartunnil, sum ynskjast lýstir, eru:

- Almenn fígging
- Alment partafelag
- APS (alment, privat, samstarv)
- Privat

Arbeiðsbólkurin hevur brúkt hesi atlit at meta um møguligar leistir at skipa verkætlanina:

- Loysnin skal geva størst møguliga samfelagsnyttu
- Loysnin skal kennast rættvís fyri flest møgulig
- Loysnin skal vera sambærilig við ta vanligu líkaregluna, t.e., at líka verkætlanir skulu viðgerast líka
- Loysnin skal í minst møguligan mun ávirka kredittvirðið hjá landinum skeiva vegin
- Gjøgnumskygni skal vera í verkætlanini

## Endamál, avmarkingar og leisturin víðari

Endamálið við hesum innleiðandi skrivi er í stuttum at lýsa skilabesta háttin at byggja og reka Eysturoyartunnilin.

Óendaliga nógvir møguleikar eru í skipan av verkætlanini frá 100% alment til 100% privat. Av tí at tíðin er avmarkað, eru nakrar fyritreytir og definitiónir settar upp, sum skilmarka ymsu skipanarhættirnar og fíggingarmøguleikarnar, soleiðis at arbeiðsbólkurin kann mæla til, hvønn hátt arbeiðast skal víðari við.

Tá avgerð er tikin, um tunnilin skal vera almennur, skipast sum alment partafelag, okkurt slag av APS ella heilt privatur, kunnu gjøllari greiningar gerast, sum lýsa leist og fíggingarhættir. Nakrir vanligir skipanar- og fíggingarhættir eru lýstir í hesum skrivi, men tá støða er tikin til ein skipanarhátt, ber veruliga til at útgreina fíggingarhættirnar og velja tann besta fyri samfelagið, sum í størst møguligan mun heldur treytirnar í arbeiðssetninginum.

## Metoda

Á hesum stigi er eitt lutfalsliga einfalt modell brúkt. Hóast hetta, hevur modellið gott frágreiðslustøði, og tað gevur tí fult út nøktandi úrslit til at byggja niðurstøðurnar á, sum skulu

nýtast til at gera eitt tilmæli út frá. Tá avgerð er tikin um leistin, kunnu modellið og fortreytirnar altíð útbyggjast, so úrslitini gerast neyvari – uttan at tær broyta niðurstøðurnar.

Modellið er sett upp sum ein gjaldførisroknskapur, tí vit meta, at hann best kann lýsa íløguna fyri tann, sum hetta er litið upp í hendur. Vit hava valt ikki at brúka eitt íløgusjónarmið (investeringskalkul), tí hetta kann vera ógreitt at skilja, og serliga kann rentuhugtakið elva til misskiljingar. Hetta merkir, at vit ikki brúka eina kalkulatiónsrentu, men lánsrentu.

# Yvirskipaðar fortreytir

## Ferðslutøl

Grundarlagið undir ferðslutølum, prísum og elastisiteti er nýggjasta tøka ferðslukanningin hjá Rambøll frá desember 2012, sum byggir á ferðsluteljingar og pendlaratøl í 2011 hjá Landsverki. Fólkatalið, bústaðarmynstrið, arbeiðspláss og bileigaraskapur, ið verður brúkt í modellunum, stava frá forsøgnini, ið Hagstovan hevur gjørt.

Í framskrivingini verður m.a. eisini tikin hædd fyri verandi infrakervi, vega- og ferðalongdum, ferð, kapasitets- og koyrikostnaði – herundir bensinprísur. Ein orsøk til, at Rambøll verður nýtt, er, at teirra ferðslumodellroyndir og metingar í sambandi við Norðoyartunnilin vóru sera eftirfarandi.

Rambøll hevur gjørt tvær framskrivingar. Tann eina er ein stagnatiónsforsøgn, har fólkatalið minkar 10%, niður í gott 43.000 fram til ár 2045, meðan hin er ein vakstrarforsøgn, har fólkatalið veksur til gott 66.000 í 2045.

Í okkara útrokningum hava vit okkum eftir at brúka ta varligu metingina, har fólkatalið minkar. Viðmerkjast skal, at hóast fólkatalið minkar, so veksur talið av bilum fyri hvønn íbúgva. Hetta kann tykjast løgið, men tað er ein sannroynd í londunum kring okkum, at so er. Akstovan væntar somuleiðis, at gongdin verður tann sama í Føroyum.

Í parti 2 eru útrokningar gjørdar við sera vánaligum fortreytum, har ferðslan gerst 30% verri, enn tað frammanundan ringast væntaða. Til tess at skapa javnvág í lýsingina, hava vit valt eisini at rokna upp á úrslitini, sum taka støði í vakstrarframskrivingini.

## Prísir og prísáseting

Rambøll hevur í sínum útrokningum víst tríggjar samansetingar av prísi og ferðslu fyri at geva eina mynd av umsetninginum í tunlinum. Á norður-suðurleiðini er minsti miðal prísur fyri persónsakfør 50 kr. annan vegin og hægsti prísur 100 kr.

Hvussu nýtslugjaldið fyri at koyra ígjøgnum tunnilin verður ásett, valdast endamálinum. Endamálið við einum almennum tunli er at fáa so stóra nyttu burturúr honum, sum gjørligt. Tí verður miðað eftir at halda nýtslugjaldið so lágt sum gjørligt fyri at hava mest møguliga ferðslu.

Um tað hinvegin verður ein privatur ánari av tunlinum,  er hansara endamál at fáa mest møguligt avkast av íløguni. Hann fer tí at finna ta samansetingina av nýtslugjaldi og ferðslu, sum gevur størst møguligan umsetning. Eftir metingunum hjá Rambøll verður nýtslugjaldið tá millum 75 kr. og 100 kr.

Hóast tað er beinleiðis samband millum minkandi prís og vaksandi ferðslu, hava vit í okkara útrokningum valt at siga, at ferðslan ikki veksur, tá nýtslugjaldið fer niður um 50 kr. Hetta fyri at gera útrokningarnar varligar.

## Rakstrarkostnaður

Rakstrarkostnaðurin er settur til 15,8 mió. kr. og inniheldur rakstur, viðlíkahald og enduríløgu. Talið er sett óvanliga høgt fyri líknandi tunlar fyri at gera útrokningarnar varligar.

## Stutt um váðan í verkætlanini

Um váðan í verkætlanini kann stutt sigast, at hann er minstur, um verkætlanin verður framd í almennum høpi (t.d. í almennum partafelagi). Hinvegin er váðin í verkætlanini munandi størri, um verkætlanin verður framd av einum privatum partafelagi.

Eitt privat partafelag hevur bara sjálvt nýtslugjaldið sum fíggingarkeldu til verkætlanina. Somuleiðis vil privata partafelagið miða eftir at renta íløguna samsvarandi høgt sum samsýning fyri at taka váðan í verkætlanini á seg, og nýtslugjaldið verður sjálvandi tá samsvarandi hægri, eins og samfelagsnyttan minni.

Tað almenna er hinvegin í eini heilt aðrari støðu. Verður verkætlanin almenn, kann tað almenna brúka samansetingina av nýtslugjaldinum til at stýra nýtsluni av samlaða vegakervinum, tí tað almenna tá varðveitir fult ræði á øllum vegakervinum. Harafturat hevur tað almenna aðrar fíggingarkeldur til verkætlanina (í ringasta føri avgjald á brennievni, vegskatt, nýtslugjald á onnur vegastrekki ella heilt aðrar skatta- og avgjaldskeldur).

At enda er at siga um váðan í sambandi við sjálva byggingina, at til ber at *minimera* hendan váðan við góðum forkanningum, og somuleiðis ber til eisini í ávísan mun at keypa tryggingar móti óvæntaðum hendingum í sjálvum byggitíðarskeiðinum. Harafturat vísa kost-nyttu kanningar av verkætlanini, at íløgan er lønandi, *hóast* byggikostnaðurin verður munandi hægri enn væntað (t.d. 1,6 mia. kr. heldur enn 1,1 mia. kr. sum væntað), og *hóast* óvæntað høgar rakstrarútreiðslur verða brúktar í verkætlanini.

## Rentur

Rentuhugtakið í teimum útrokningunum, sum gjørdar eru, fevnir um lánsrentuna fyri fremmandan kapital. Torført er at meta um frammanundan, hvør lánsrenta er mest sannlík í teimum ymsu loysnunum. Hetta valdast kredittvirðið hjá tí eind, sum stendur fyri lántøkuni, og hvørjar trygdir verða settar í sambandi við lántøkuna. Fyri at fáa eina mynd av muninum á loysnunum fyri brúkaran, verður tó *rentumunurin* mest týðandi. Hvat støði rentan fer at leggja seg á, er í síðsta enda ein samráðingarspurningur, ið er neyvt tengdur at evni, vilja og ávirkan uttanífrá.

Við støði í rentuni á miðallongum donskum ríkislánsbrøvum í løtuni og rentum á donskum realkredittlánsbrøvum og við mettum váðaískoyti, umframt møguligan kostnað fyri at læsa rentuna fasta eitt ávíst tíðarskeið, hevur arbeiðsbólkurin valt at gera útrokningar fyri ymsu loysnirnar við hesum mettum rentum:

Almenn verkætlan: 3,5% p.a.
Alment partafelag: 4,5% p.a.
APS: 4,5%-5%
Privat partafelag: 5% p.a. (lánsrenta til fremmandan kapital)

## Kredittvirðið hjá landinum

Sum útgangsstøði er kredittvirðið hjá landinum sera gott og verður eisini sannlíkt gott í rúma tíð frameftir. Tað almenna vil í útgangsstøði altíð hava besta kredittvirðið í einum landi.

Torført er at meta um, hvussu ein tílík verkætlan fer at ávirka kredittvirðið hjá landinum, men mest sannlíkt kann landið, um rætt verður borið at, taka á seg lántøkuna til at fara undir hesa verkætlanina, uttan at lántøkan ávirkar kredittvirðið stórvegis. Tað almenna í Føroyum hevur ikki nógva skuld samanborið við skuldina í øðrum londum í Vesturheiminum. Sæð yvir longri tíðarskeið, fer ein tílíkur tunnil sannlíkt at hava við sær hægri búskaparvøkstur og meira dynamikk, og átti ikki at ávirka kredittvirðið hjá landinum skeiva vegin.

Sum umstøðurnar eru á fíggjarmarknaðunum í løtuni og við tí rating, sum landsstýrið hevur, kostar eitt møguligt mist ratingstig umleið 0,25%-stig í rentuútreiðsum. Mett verður, at verkætlanin í ringasta føri kann merkja eitt mist ratingstig hjá landsstýrinum í byggitíðini og harvið 0,25%-stig meira í rentuútreiðslum. Men hetta verður samanumtikið ikki mett at vera sannlíkt, tí skuldin hjá landsstýrinum ikki er høg sammett við onnur lond. Sannlíkt hevur tað størri týdning fyri ratingina, um landsstýrið næstu árini fær betrað javnvágina millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Sæð yvir longri tíðarskeið kann hugsast, at verkætlanin fer at betra um kredittvirðið hjá landinum, tí hon sannlíkt fer at hava hægri búskaparvøkstur og møguligar inntøkur til samfelagið við sær.

Ein møguleiki, sum kann verða umhugsaður, um ætlanin er at skjóta partapening í eitt alment partafelag við innskoti av fíggjarlógini, er at seta í gildi ein tíðaravmarkaðan skatt. T.d. ein sum líkist heilsutrygdargjaldinum, soleiðis at innskotið ikki ávirkar úrslitið á fíggjarlógini stórvegis. Harvið hevði sannlíkt eingin ávirkan verið á kredittvirðið ella á ratingina hjá landinum sæð yvir eitt styttri tíðarskeið.

### Samfelagsnytta

Landsverk hevur kostnyttu-útrokningar av Eysturoyartunlinum, sum vísa, at nettonyttan er góðar 1,7 mia. kr. Hetta merkir, at útrokningar eru gjørdar, har hædd er tikin fyri íløgu, rentu, restvirði, rakstrarútreiðslum, vunnari tíð, spardum kilometrum, færri óhappum, brúkaragjøldum, dálking, avleiddari ferðslu og ymsum øðrum tjóðarbúskaparligum faktorum. Tá henda útrokning vísir eina positiva nettonyttu, merkir tað, at íløgan loysir seg at fremja. Útrokningin eigur at verða dagførd, men ein dagføring er sera tíðarkrevjandi og broytir ikki niðurstøðuna, sum er, at verkætlanin gevur eina positiva nettonyttu. Samfelagsnyttan á 1,7 mia. kr. er grundað á eitt nýtslugjald á 50 kr. og 4.220 bilar. Ein annar háttur at lýsa samfelagsnyttu er at siga, at jú fleiri bilar koyra ígjøgnum Eysturoyartunnilin, tess størri er samfelagsnyttan. Og fyri at fáa so nógvar bilar at koyra ígjøgnum tunnilin sum gjørligt, má nýtslugjaldið vera lægst møguligt.

### Fíggingarhættir

Vit hava í høvuðsheitum fýra hættir at fíggja eina íløgu. Hesir eru:

- Nýtslugjald (brúkaragjald)
- Vegskattur
- Brennievnisavgjald
- Vanligur skattur yvir fíggjarlógina

Alt eftir, hvør tunnilsloysn verður nýtt, kunnu hesir hættir brúkast. Allir fíggingarhættir hava ikki somu samfelagsnyttu. Í stuttum kann sigast, at tann, ið hevur størst nyttu, er tann fíggingarhátturin, sum brúkarin merkir minst. Í hesum føri er talan um ein tunnil, sum verður fíggjaður yvir skattin. Í viðheftu skjølunum er nærri greitt frá um samanhangin millum nyttu og fíggingarhættir.

## Útrokningar

### Almennur tunnil

At tunnilin er almennur, merkir, at hann er á fíggjarlógini sum einhvør annar postur, har inntøkurnar – alt eftir, hvør fíggingar-háttur verður nýttur – eru vístar á inntøkusíðuni. Samfelagsnyttan er størst við almennum tunli, tí tað almenna kann seta lægsta prísin og fara eftir einum møguligum halli aðrastaðni á fíggjarlógini.

Tað er ivasamt, um tað fer at kennast rættvíst hjá øllum borgarum í samfelagnum at fremja verkætlanina yvir skattin, tí givið er, at ikki øll fáa líka stóra gleði av tunlinum.

Vágatunnilin og Norðoyatunnilin eru skipaðir í almennum partafeløgum. Um Eysturoyartunnilin verður lagdur beinleiðis á fíggjarlógina, eru ikki allir undirsjóvartunlarnir skipaðir eins, og tí er líkareglan ikki hildin.

Um verkætlanin kemur at ávirka fíggjarlógina beinleiðis, fer hetta sannlíkt at ávirka kredittvirðið hjá landinum. Ilt er at siga, hvussu stór ávirkanin verður, men hetta kann t.d. kosta eitt stig skeiva vegin í ratingini í byggitíðarskeiðinum. Men samanumtikið verður ikki hildið sannlíkt, at landsstýrið missir eitt ratingstig av hesi verkætlanini, m.a. tí at skuldin frammanundan er lág. Hvat síðani hendir við ratingini, tá tunnilin gevur eitt positivt íkast til búskapin, er ilt at meta um,tí ratingin eisini er tengd at

øðrum faktorum, sum einki hava við tunnilin at gera. Isolerað sæð, er tó væl hugsandi, at ratingin rættar seg uppaftur, eftir at tunnilin er tikin í nýtslu, og samfelagsnyttan er sligin ígjøgnum.

Vandi kann vera fyri vantandi gjøgnumskygni, um tað almenna fer at krevja inntøkurnar inn antin við beinleiðis skatti, sum meirkostnað á brennievni, vektgjaldi, brúkaragjaldi ella sum ein samanseting av hesum, tí alt fer í sama kassa, og ilt verður at síggja samanhangin í verkætlanini.

**Úrslit**

| Min. prísur fyri persónsakfør á N/S leiðini | | | |
|---|---|---|---|
| ALMENT | Byggikostnaður (mió. kr.) | | |
| Renta (30 ár) | 1.000 | 1.200 | 1.500 |
| 3,0% | 27,00 | 30,75 | 36,50 |
| 3,5% | 28,00 | 32,00 | 38,00 |
| 5,0% | 31,00 | 35,50 | 42,50 |

Mest sannlíki prísurin er kr. 32.

## Alment partafelag

At tunnilin er skipaður sum eitt alment partafelag, merkir, at tunnilin er hildin uttan fyri fíggjarlógina. Samfelagsnyttan verður mett at vera eitt vet minni, enn um tunnilin er reint almennur. T.e. á fíggjarlógini, tí almenna partafelagið fer at fíggja rentur og avdráttir av skuldini við nýtslugjaldi, og hetta verður sannlíkt eitt vet hægri sammett við í eina reint almenna loysn fíggjað á fíggjarlógini.

Hildið verður, at borgarar fara at kenna leistin sum rættvísan, tí soleiðis eru hinir undirsjóvartunlarnir eisini skipaðir, og tí tunnilin verður fíggjaður við nýtslugjaldi eins og aðrir undirsjóvartunlar.

Av øllum fýra leistum heldur bert hesin líkaregluna, har allir undirsjóvartunlar eru skipaðir sum almenn partafeløg. Tó er tann munur, at hinir undirsjóvatunlarnir fingu sløk 60% í innskotnum partapeningi. Í sambandi við Eysturoyartunnilin er ikki sannlíkt, at 60% av væntaða byggikostnaðinum verður fíggjað við innskoti av fíggjarlógini.

**Úrslit**

| Min. prísur fyri persónsakfør á N/S leiðini | | | |
|---|---|---|---|
| ALMENT P/F | Byggikostnaður (mió. kr.) | | |
| Renta (30ár) | 1.000 | 1.200 | 1.500 |
| 4,0% | 29,00 | 33,25 | 39,50 |
| 4,5% | 30,00 | 34,25 | 41,00 |
| 6,0% | 33,00 | 38,00 | 45,50 |

Mest sannlíki prísurin er 34,25 kr.

Eitt alment partafelag kann ávirka ratingina hjá landinum alt eftir, hvussu stórt innskotið er, tí hetta sum útgangsstøði fer beinleiðis av fíggjarlógini.

Møguleikin at sleppa undan at fara á fíggjarlógina eftir øllum innskotinum, eigur at verða umhugsaður. Hetta kann gerast við at skjóta ein part av eginpeninginum á 400 mió. úr hinum tunlunum inn sum apportinnskot í nýggja almenna eysturoyartunnilsfelagið, ella inn í eitt nýstovnað samlað tunnilsfelag.

Felagið skal vísa á grannskoðaðar roknskapir, har landið kann krevja, at gjøgnumskygni er í kostnaði og inntøkum.

## Alment, privat, samstarv (APS)

Alment- privat-samstarv (APS) merkir í stuttum, at tað almenna og eitt privat partafelag gera sáttmála um í felag at fíggja, byggja og/ella reka eina samferðsluútbygging ella annað undirstøðukervi, sum vanliga verður rikið av tí almenna.

Í hesum føri hevði eitt alment, privat, samstarv (APS) merkt, at landið saman við nøkrum privatum feløgum og almennum grunnum (t.d. LÍV) stovna eitt partafelag, sum síðani ger sáttmála um prísáseting á nýtslugjaldinum og um lántøkuna hjá felagnum. Hetta hevði fevnt um kostnaðin á lántøkuni, og um hvussu lántøkan skal verða býtt millum eginkapital og lánifígging.

Eitt alment, privat samstarv kann verða skipað soleiðis, at tað í stóran mun minnir um eitt alment partafelag, sum fíggjar seg við lántøku. Í tí føri er verkætlanin fyri brúkaran og samfelagið at sammeta við eitt alment partafelag. Um rætt verður farið fram við einum skilagóðum sáttmála, har tað almenna tryggjar sær ávirkan á nýtslugjaldið, og um eitt tílíkt samtak kann fíggja seg til lagaligar treytir, ber helst til at fáa stóra samfelagsnyttu úr eini tílíkari loysn.

Eydnast ikki at fremja verkætlanina í einum almennum partafelagi, mælir arbeiðsbólkurin til, at loysnin við einum almennum, privatum, samstarvi verður kannað nærri.

Ein tílík loysn fer sannlíki eisini at kennast rættvís, um tunnilin verður fíggjaður við nýtslugjaldi samsvarandi tí, sum er í Vága- og Norðoyatunlinum. Ein loysn við almennum-privatum samstarvi verður tó ikki heilt í samsvari við líkaregluna, tí hinir tunlarnir ikki júst eru skipaðar á henda hátt. Sum nevnt ber tó til at seta ein sáttmála saman soleiðis, at tað fyri brúkaran nærum ikki fer at kennast munur á hesi loysnini og einum almennum partafelagi.

Kredittvirðið hjá landinum nýtist ikki at vera nógv ávirkað av eini loysn við almennum-privatum samstarvi, um landið t.d. skjýtur 200-300 mió. kr. í felagið (hetta kann eisini gerast saman við øðrum eigarum), umframt møguligt apportinnskot av hinum tunlunum í eitt samlað tunnilsfelag. Gjøgnumskygnið í hesi loysnini kann vera gott, tí at eitt tílíkt felag fer at leggja fram roknskapir og inntøkur og rakstrarútreiðslur, sum í hesum føri vera í einum og sama felagi.

Royndir aðrastaðni av almennum, privatum samstarvi eru yvirhøvur, at tílíkar verkætlanir ofta vera óneyðuga kostnaðarmiklar fyri brúkaran.[1] Í flestu førum ber til at fíggja samferðsluútbyggingar væl bíligari í almennum høpi sammett við í almennum, privatum samstarvi.

Í sambandi við samferðsluútbyggingar fara tað almenna og eitt privat partafelag altíð hava mótstríðandi áhugamál. Eitt privat partafelag fer at prísáseta eftir at fáa so nógvan umsetning og harvið avlop, sum tilber. Tað almenna fer hinvegin at prísáseta eftir at fáa so nógva nýtslu og harvið samfelagsnyttu, sum gjørligt.

## Privat verkætlan

Ein privat verkætlan hevði í hesum føri fevnt um, at eitt privat partafelag stóð fyri byggingini, fíggingini, ognarrættinum, rakstrinum og síðani flutti ognarrættin uttan kostnað til tað almenna, tá eitt frammanundan avtalað sáttmálatíðarskeið var runnið (ofta 25-50 ár), ella tá ein frammanundan avtalað renting av íløguni er rokkin. Aðrastaðni verður hetta ofta nevnt *Build-Own-Operate-transfer*-sáttmálar ella *BOOT*-sáttmálar.

Um tað almenna í Føroyum var í eini støðu, har tað ikki var ført fyri, ella ikki hevði lánføri (kredittvirði) til at átaka sær ta neyðugu lántøkuna til at fara undir byggingina av verkætlanini, hevði hetta kunnað talað fyri, at ein privat loysn samanumtikið var ein skilagóð loysn fyri samfelagið.

Í hesum føri er tað almenna í Føroyum í eini støðu, har tað hevur gott lánføri til at fara undir byggingina av eini tílíkari verkætlan og er ført fyri at taka á seg váðan. Tað almenna í Føroyum er væl fyri, hevur samanumtikið lítla skuldarbyrðu og gott kredittvirði, og kann seta á stovn eitt alment partafelag, sum verður somikið væl fyri, at tað kann taka á seg váðan og ta neyðugu lántøkuna til at fara undir byggingina (t.d. við peningainnskoti og apport innskoti av øðrum undirsjóvartunlum í eitt nýtt samlað tunnilsfelag).

Vansin við eini privatari verkætlan er, at eitt privat partafelag prísásetur eftir at fáa mest møguligan umsetning og størst møguligt avlop, umframt at fíggingin verður munandi dýrari. Harvið verða nýtslugjøldini samsvarandi hægri, og samfelagsnyttan samsvarandi minni.

Ein privat loysn fer neyvan at kennast rættvís í hesum føri. Ein slík loysn merkir, at brúkarar av Eysturoyartunlinum rinda nýtslugjald til eitt privat felag, sum prísásetur eftir at fáa hægst møguligt avlop, meðan brúkarar av Vága- og Norðoyatunlinum rinda nýtslugjald til eitt alment partafelag, sum prísásetur eftir at fáa mest møguliga nýtslu og nyttu. Ein loysn, har tunnilin verður framdur av einum privatum partafelagi, samsvarar ikki við vanligu líkaregluna, tí Vága- og Norðoyatunnilin eru framdir av almennum partafeløgum.

Sum útgangsstøði er ikki væntandi, at ein privat loysn fer at ávirka kredittvirðið hjá landinum, uttan at tað almenna óbeinleiðis ella beinleiðis bindir seg til at gera atkomuvegir og møguliga aðrar atknýttar útbyggingar av samferðslukervinum.

[1] Sí t.d. CEE Bankwatch Network, *Never mind the balance sheet - the dangers posed by public-private partnerships in central and eastern Europe*, http://bankwatch.org/sites/default/files/never_mind_the_balance_sheet.pdf.

Royndir higartil benda á, at gjøgnumskygnið í eini privatari verkætlan verður nógv verri sammett við hinar nevndu formarnar. Samanumtikið talar einki fyri, at tað er neyðugt hjá tí almenna at fremja hesa verkætlanina í eini privatari loysn.

| | 75 kr. | 100 kr. |
|---|---|---|
| Brúkaratap | 2,6 mia. | 3,5 mia. |

Mest sannlíkt 3,5 mia. kr.

## Keldulisti

Hetta tilmælið við greiningum byggir á keldutilfar, ið frammanundan er til taks, umframt óformligar samrøður við fakfólk. Í eini víðari viðgerð við tí fyri eyga at røkka einum neyvari úrsliti verður sjálvandi farið gjølligari til verka. Tó skal leggjast dentur á, at vit meta, at núverandi keldutilfar er nøktandi fyri góðskuna á hesum fyribils niðurstøðunum.

- Landsverk
- Fíggjarmálaráðið
- Fígging Landsins
- Bank Nordik
- Ferðsluframskriving Rambøll 2012
- Notat frá Landsverki
- EIK Banki
- Sund & Bælt 2013

# Viðheft skjøl

## Fíggingarhættir

Um øll verkætlanin verður fíggjað við brúkaragjøldum, fer kostnaðurin fyri at brúka annleggið hjá tí einstaka brúkaranum at kennast høgur. Tað ber í sær, at anleggið verður brúkt sum minst. Sjálvandi minkar hetta um slit og møguligt CO2 útlát, men samfelagsnyttan verður lág í mun til, um alt verður fíggjað alment. Tá fer nýtslan at verða munandi størri, tí brúkarin fer at kenna tað sum eina ókeypis nýtslu. (At so er, sæst aftur í teimum ókeypis tunnilsdøgunum hjá Norðoya,- og Vágatunlinum, har fólk ferðast munandi meira enn vanligt).

Vegskattur tekur ikki hædd fyri, hvussu nógv ein brúkar vegirnar, men er ístaðin eitt fast gjald, sum bilánarin má gjalda óansæð nýtslu. Hetta er eitt samhaldsfast gjald, har tann, ið nýtir vegirnar nógv, rindar lutfalsliga minni. Men hesin gjaldsháttur avmarkar ikki ferðsluna og er tí samfelagsnyttugur. Brennievnisavgjald hevur tann fyrimun, at tað eru tey, ið nýta vegirnar – bilánarar og brúkarar – ið rinda fyri vegakervið. Samstundis stimbrar brennievnisavgjaldið til eina rationella nýtslu, tífleiri fólk í einum akfari kunnu býta rokningina millum sín.

Um tunnilin verður fíggjaður yvir fíggjarlógina og tískil verður rindaður yvir skattin, fer nýtslan at vera størst og harvið eisini samfelagsnyttan. Hinvegin skapar tað eina ávísa ónøgd fyri tey, ið ikki nýta kervið. Ein vansi er, at rakstur og viðlíkahald liggja beinleiðis undir politisku skipanini, tí vandi er fyri, at tað tá ikki verður rikið optimalt.

Allir gjaldshættirnir hava sínar fyrimunir og vansar, og tí verða teir oftani nýttir saman. Lutfallið millum gjaldshættirnar og váðan verður ásett av politiska myndugleikanum.

| **Almennur tunnil við ongum nýtslugjaldi** | | | |
|---|---|---|---|
| Árligt hall | -kr. 83.065.855 | Krónur | Eind |
| Fígging av halli | | | |
| Brennievni | 100% | -2,97 | pr. litur |
| Vektgjald | 100% | -2.876 | Meir vektgjald pr. akfar |
| Skattur | 100% | - 83.065.855 | á fíggjarlóg |
| Íalt | | | |
| Nýtslugjald | 0 kr. | | |

# Eysturoyartunnilin

## Partur 2

**Arbeiðsbólkur:**
Róaldur Jákupsson
Tórir Michelsen
Hans Albert Hansen

**Stýrisbólkur:**
Rúni Joensen
Kaj Johannesen
Bjarni Askham Bjarnason
Bjørgfríð Ludvig
Pól Edvard Egholm
Petur Petersen
Marjun Hanusardóttir
Ewald Kjølbro

**18-09-2013**

# Indhold

Inngangur ........ 2

Fortreytir, metoda og avmarkingar ........ 2

Møguleikar at skipa eitt alment partafelag ........ 2

Møguleikar at skipa eitt felag í eini APS-loysn ........ 3

Samandráttur av APF og APS-loysn ........ 4

Fremmanda fígging ........ 6

  Lánsfíggingin – bankalán og lánsbrøv ........ 6

  Rentan á lánsfíggingini ........ 6

Hættir at minka um kredittávirkanina hjá landinum ........ 7

Viðbreknisgreining ........ 7

  Val av fyritreytum ........ 7

Inntøkumøguleikar í verkætlanini ........ 10

Tíðarætlan ........ 11

  Forkanningar ........ 11

  Projektering ........ 11

  Keyp av jørð ........ 11

  Bygging ........ 11

Niðurstøður ........ 12

Tilmæli ........ 13

Framhaldandi viðgerð ........ 14

Keldulisti ........ 14

## Inngangur

Við støði í parti 1 í uppritinum verður í parti 2 hugt nærri eftir teimum báðum leistunum, ið viðmælt varð at granska og greina nærri, tí at teir út frá mettu atlitunum vóru til størst gagn fyri samfelagið. Bestu hættirnir at skipa Eysturoyartunnilin verða mettir at vera sum Alment partafelag (APF) ella sum APS (Alment, Privat, Samstarv).

Fyribils varð valt frá at fara víðari við einari reinari almennari loysn beint á fíggjarlógini, tí hetta varð mett at ávirka fíggjarlógina og møguliga eisini kredittvirðið í ov stóran mun.

Tann privata loysnin varð vald frá, tí samfelagsnyttan, brúkaratapið o.o. atlit, vórðu hildin at vera ávirkað ov nógv sammett við fáu fyrimunirnar, ið eru knýttir at hesum leisti.

Endamálið við parti 2 er at lýsa APF og APS nærri og at sammeta hesi. Hugt verður eisini eftir møguleikunum fyri fremmandafígging, og hvussu hendan kann fáast bíliga til vega, og hvat krevst. Hugt verður eftir háttum at minka um ávirkanina á kredittvirðið hjá landinum. Fíggjarligi parturin av verkætlanini verður greinaður, og viðbreknisgreiningar verða gjørdar fyri at lýsa fíggjarliga váðan í verkætlanini. At enda verður hugt eftir verkætlanini sum ein møgulig inntøkukelda til landið.

## Fortreytir, metoda og avmarkingar

Fyri ikki at taka upp í saman, verða somu fortreytir og metoda o.l. brúktar sum í Parti 1. Tó er rentan fyri APS, har einki veð er, uttan trygdin, sum óbeinleiðis er í eginognini á 33%, mett at vera 5,5% (10ára renta) í mun til 5%, sum áður brúkt.

Sambært arbeiðssetninginum eru møguleikar og loysnir við Norðoya- Vága- og Sandoyar-tunlunum ikki tiknir við í uppritið.

## Møguleikar at skipa eitt alment partafelag

Eitt alment partafelag verður stovnað við landinum sum einasta partaeigara, eftir sama leisti sum hini undirsjóvatunnilsfeløgini.

Verklagslóg skal gerast, har m.a. ásett verður, hvussu eginfíggingin/lán til sjálva verkætlanina verður goldin. T.d. 400 mió. kr. yvir 5 ár e.l. í samsvari við fíggingarleistin og byggitíðina ella við øðrum aktivum.



Møguleiki er fyri at fáa fíggingarfyrimunirnar við øktari trygd. Vandin hjá landinum í einum veðhaldi til hesa verkætlan er sera lítil – vísandi til greiningarnar niðanfyri. Lánibyrðan hjá landinum í dag er lág í mun til lond, vit sammeta okkum við. Tí vil eitt veðhald neyvan ávirka kredittvirðið. Kredittvirðið verður í nógv størri mun mett út frá hallinum á fíggjarlógini og serliga, hvørt landið erført fyri at røkka málinum um at fáa betri javnvág millum almennar inntøkur og útreiðslur næstu árini.

## Møguleikar at skipa eitt felag í eini APS-loysn

So skjótt sum landið ikki hevur 100% ognarlut í felagnum, er talan um eina APS-loysn. Ein APS-loysn er myndað av íleggjarum við ymiskum áhugamálum – tað almenna hevur eitt nyttuendamál, meðan privatu íleggjararnir í høvuðsheitum hava vinning sum einasta endamál.

Um samfelagsnyttan skal tryggjast í eini APS-loysn, er umráðandi, at tað almenna hevur týðandi ávirkan á eginkapitalin í felagnum.

Hugsast kann, at t.d. føroyskir íleggjarar hava áhuga at koma inn í eginkapitalin. Eitt nú LÍV o.o. líknandi feløg og grunnar, umframt privatir íleggjarar. Hesir kunnu tó eisini fáa lut í verkætlanini umvegis fremmandafíggingina. Hetta verður mett at vera ruddiligari, enn at hava teir inni í eginkapitalinum.

Fyrimunur er at hava fáar íleggjarar í eginpeninginum við avmarkaðum valdi. Hetta kann gerast við B-partabrøvum, sum t.d. kann tryggja teimum eitt ávís avmarkað avkast í eitt tíðarskeið. Somuleiðis ber eisini til at avmarka ognarskapin til ávíst tíðarskeið, so tað slepst undan trupulleikum og tvístøðum, tá lántøkan er afturgoldin.

Landið kann fara inn við eginpeningi í eina APS loysn á óteljandi aðrar hættir enn við reiðum partapeningi. Landið kann t.d. veita einum felagi trygdir av ymiskum slagi. Eitt nú við beinleiðis fíggjarligum veðhaldi, tryggja eina minstu ferðslu, ella við at leggja ein botn undir verkætlanina á ymiskar aðrar hættir, afturfyri at felagið tryggjar samfelagið og brúkaran.

Nógvir APS leistir finnast. Men av tí, at niðurstøðan ikki broytist stórvegis, verða hesir møguleikar ikki viðgjørdir víðari.

Ein vansi við APS-loysnini, um landið veðheldur fyri lántøkuni hjá einum tílíkum felagi, er tann ójavni, sum altíð vil vera í einum tílíkum veðhaldi. Landið hevði tá beinleiðis ella óbeinleiðis ábyrgdast fyri allari skuldini, men hevði samtundis býtt avlopið í verkætlanini og ta lágu rentuna, sum hevði komið av veðhaldinum, við aðrar eigarar.



## Samandráttur av APF og APS-loysn

Samfelagsnyttan vil sannlíkt vera størst í eini loysn við einum almennum p/f, sum hevur til uppgávu at fáa rakstur í verkætlanina við lægst møguliga nýtslugjaldinum. Í eini APS-loysn við privatum partaeigarum kann hugsast, at nýtslugjaldið verður nakað hægri. Men við einum skilagóðum sáttmála millum partaeigararnar, har landið fær ávirkan á prísásetingina, ber óivað til at fáa betri samfelagsnyttu úr verkætlanini.

Verður rætt atborið, ber óivað til at fremja hesa verkætlanina á ein hátt, so tað fyri brúkaran fer at kennast lítil munur á hesi verkætlanini og á Vága- og Norðoyatunlinum.

Ávirkanin á kredittvirðið hjá landinum verður ymisk alt eftir, hvussu stórt innskotið hjá landinum í felagið verður, og hvussu hetta verður fíggjað (og serliga hvussu fíggjarlógin verður ávirkað). Alt eftir, um landið veðheldur fyri lántøkuna hjá felagnum, fer hetta eisini at ávirka kredittvirðið hjá landinum.

Óbeinleiðis vil landið altíð ábyrgdast fyri skuldina í einum felagi, sum landið er partaeigari í.Í hesum føri er ikki sannlíkt, at landið hevði latið eitt alment tunnilsfelag farið á húsagang. M.a. hevði hetta í sær sjálvum verið eitt óheppið tekin til lánveitarar, og hevði tí á tann hátt ávirkað kredittvirðið hjá landinum og øðrum almennum partafeløgum. Tí hevði landið eins væl kunnað veðhildið beinleiðis fyri skuldini hjá felagnum. Harvið hevði rentan á lántøkuni verið tað lægri.

Av tí at hinir tunlarnir eru skipaðir í almennum partafeløgum, er líkareglan hildin, um hendan verkætlanin eisini verður framd í einum slagi av almennum partafelagi. Tað vil helst eisini kennast rættvíst fyri fólk flest, um henda verkætlanin verður framd á líknandi hátt sum aðrir tunlar og við líknandi prísáseting. Hinvegin vil tað neyvan kennast rættvíst, um henda verkætlanin verður framd í eini APS-loysn, har privat partafeløg fáa stóra ávirkan á prísásetingina, og nýtslugjaldið harvið verður hægri.

Váðin fyri at verkætlaninin dýrkar liggur hjá eginkapitalinum, og í hesum førinum hjá landinum. Greiningar longri frammi vísa tó, at váðin allur mest sannlíkt kann dekkast við nýtslugjaldinum uttan at nerva ferðsluna.

Partafelagsformurin ger tað eisini møguligt, at nýggir íleggjarar kunnu koma upp í seinni.

| | Alment | Alment p/f | APS | Privat |
|---|---|---|---|---|
| **Byggikostnaður** | 1,2 mia. | 1,2 mia. | 1,2 mia. | 1,2 mia. |
| **Lánsrenta** | 3,5% | 4,5% | 5 til 5,5% | 5,5% |
| **Prísur persónbil n/s** | 32 kr. | 34,25 kr. | 36,25 til 100 kr. | 100 |
| **Meirkostnaður fyri brúkara** | 0 kr. | 2,25 kr. | 4,25 til 68 kr. | 68 kr. |
| **Samfelagsnytta** | 1,7 mia. ++ | 1,7 mia. + | 1,7 til 1,4 mia. | 1,4 mia. |
| **Brúkaratap** | 0 kr. | 198 mió. | 367 mió. - 3,5 mia. | 3,5 mia. |

(Við almennari loysn, sum fevnir um brúgv um Skálafjørðin, verður samfelagsnyttan minst 1,8 mia. kr.)

Gjøgnumskygnið í verkætlanini vil sannlíkt vera best, um hon verður framd av einum almennum partafelagi við bara landinum sum eigara. Hinvegin kann gjøgnumskygnið eisini vera gott í eini APS-loysn, um ikki ov nógvir eigarar vera, og um hesir ikki hava ov ymisk áhugamál. Ein loysn við einum almennum partafelagi við landinum sum einasta eigara, er sannlíkt tann loysnin, sum skjótast kann verða framd í verki, um vilji er til tað. Hetta tí, at fleiri partaeigarar tá ikki skulu semjast um ognarpart og møguligan sáttmála millum partarnar. Hesin leisturin er eisini royndur áður av landsstýrinum við góðum úrslitum.

| **Metingaratlit** | **APS** | **Alm p/f** | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|---|
| Samfelagsnytta | +(+) | ++ | |
| Rættvísi | + | + | |
| Líkaregla | (+) | + | |
| Kredittávirkan | (-) | (-) | |
| Gjøgnumskygni | (+) | + | |
| Tíð | - | + | |
| Váði | (-) | - | |
| Annað | - | + | Mótstríðandi áhugamál og leiðsla |
| | - | + | Flyting av gjaldføri millum feløg |
| | + | + | Møguleiki fyri nýggjum eigarum |

# Fremmanda fígging

## Lánsfíggingin – bankalán og lánsbrøv

Aftan á at støða er tikin til eginpeningsviðurskiftini, er eisini tørvur á lántøku fyri at fíggja íløgukostnaðin.

Í høvuðsheitum eru tveir møguleikar fyri lántøku, umframt grunnalán. Í fyrra lagi ber til at taka bankalán og í øðrum lagi lánsbrævalán, har lánsbrøvini eru skrásett á einum keypsskála/fondsbørsi. Fyrimunirnir við lánsbrævaláninum eru ein breiðari íleggjaraskari, og at rentan sannlíkt verður eitt vet lægri sammett við eitt bankalán.

Eitt bankalán hevði í hesum føri helst verið eitt samansett lán millum fleiri bankar, og føroyskir og útlendskir bankar høvdu kunnað verið við í einum tílíkum.

Eitt bankalán frá NIB, Nordic Investment Bank, er sannlíkt eisini ein møguleiki. Fyrimunurin við einum bankaláni er, at tað kann avgreiðast skjótt. Rentan kann hinvegin vera hægri á einum bankaláni sammett við eitt  lánsbrævalán.

Ein møguleiki er, at landið veðheldur beinleiðis fyri lántøkuni hjá felagnum við einum fíggjarligum veðhaldi. Í tí førinum hevði møguliga ikki verið neyðugt við nógvum eginpeningi í felagnum, tí kredittvirðið hjá felagnum tá hevði verið sera gott. Eitt beinleiðis fíggjarligt veðhald hevði ávirkað kredittvirðið hjá landinum meira sammett við, um eitt sjálvstøðugt alment partafelag stóð fyri lántøkuni.

Hóast ein verkætlan er fíggjarliga sterk, so leggja bankarnir stóran dent á, at landið veðheldur, tí tað ávirkar ikki solvenskrøvini til bankan.

## Rentan á lánsfíggingini

Rentan á lánsfíggingini verður lægri, jú hægri eginpening partafelagið hevur at standa ímóti við, og tess betri trygdir kunnu setast í veð í sambandi við lántøkuna. Ein tílík verkætlan skal helst kunna tola, at byggikostnaðurin í ringasta føri verður umleið 30-40% dýrari sammett við upprunaætlanirnar, uttan at eginognin hvørvur. Eitt tílíkt felag má tí helst hava um 30-40% í eginogn at standa ímóti við.

Eitt tílíkt felag hevði sannlíkt uttan stórvegis trupulleikar kunnað tikið lánsbrævalán ella eitt samansett bankalán til umleið 5-5,5% p.a. (umleið 10 ára lán) við hægri rentu í byggitíðini og við lægri rentu eftirfylgjandi. Við veðhaldi frá landinum, hevði rentan verið lægri.

Í løtuni er rentan á fíggjarmarknaðunum somikið lág, at rentuváðin í eini tílíkari verkætlan er avmarkaður. T.d. hevði borið til at tikið eitt 10 ára lán við lágari rentu, og tá lánið síðani hevði verið endurfíggjað, hevði tað verið niðurgoldið við umleið 1/3. Rentan tey síðstu 20 árini er tá ikki so týðandi fyri samlaða lønsemið í verkætlanini.

## Hættir at minka um kredittávirkanina hjá landinum

Er greiða fingin á kapitalstrukturinum, t.v.s. at støða er tikin til býtið millum egin- og fremmandafígging, eru fleiri møguleikar at minka um neiligu kredittávirkanina hjá landinum. Nakrir av hesum eru nevndir niðanfyri.

Spara upp

- Hækka landsskattin tíðaravmarkað
- Serskattur sum t.d. heilsutrygdargjaldið
- Brennievnisavgjald (1 kr. fyri hvønn litur av brennievni gevur knappar 30 mió. kr. árliga)
- Økja um vektgjaldið. (1.000 kr. í meiravgjaldi á øll akfør um árið gevur eisini 30 mió. kr. árliga)
- Onnur avgjøld

Minka um íløguna

- Minka um almenna ognarlutin
- Avdekka byggiváðan
- Selja byggiætlanina við eini keypsoptión
- Endurskoða linjuføringina (Uppskot frá Landsverk fyriliggur, sum minkar íløguna við 200 mió. kr. og hevur størri nyttu enn verandi uppskot)
- At býta verkætlanina sundur í brúgv og tunnil betrar um møguleikan at stýra váðanum.

## Viðbreknisgreining

Endamálið við talvunum niðanfyri er at lýsa fíggjarligu ávirkanina á verkætlanina undir broyttum fortreytum. Kannað verður, hvussu byggikostnaðurin og rentan ávirka nýtslugjaldið. Eisini verður hugt eftir, hvørjar avleiðingar ein ógvuslig minking í ferðsluni vil hava á nýtslugjaldið. Mett verður um fíggjarliga váðan og møguleikarnar í verkætlanini, og hvussu hetta kann ávirka landið.

### Val av fyritreytum

Byggikostnaðurin fyri sjálva verkætlanina við 10% lagt omaná fyri óvæntaðar útreiðslur, umframt byggirentur, er mettur mest sannlíkt at vera um 1.200 mió. kr. Royndir vísa, at tað er meira sjáldsamt, at verkætlanir gerast nógv bíligari enn mett. Tí er bert eitt dømi við minni byggikostnaði á 1.000 mió. kr. Hinvegin er meira sannlíkt, at verkætlanin dýrkar. Tí eru nøkur dømir sett upp, har tað í ringasta føri verður ein byggikostnaður á 1.700 mió. kr.

Í myndini niðanfyri er til hvønn einstaka byggikostnað roknað eitt minsta nýtslugjald, tá rentan verður broytt. Hetta verður gjørt fyri at vísa, hvussu nýtslugjaldið verður ávirkað undir broyttum byggikostnaði og broyttari rentu. Hetta gevur eisini eina góða mynd, av hvussu stórur váðin í verkætlanini er, og um verkætlanin sjálv er før fyri at bera váðan.

| Min. prísur fyri persónsakfør á N/S leiðini | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Byggikostnaður (mió. kr.) | | | |
| Renta (30ár) | 1.000 | 1.200 | 1.500 | 1.700 |
| 3,00% | 27 | 31 | 37 | 40 |
| 3,50% | 28 | 32 | 38 | 42 |
| 4,00% | 29 | 33 | 40 | 43 |
| 4,50% | 30 | 34 | 41 | 45 |
| 5,00% | 31 | 36 | 43 | 47 |
| 5,50% | 32 | 36 | 44 | 48 |
| 6,00% | 33 | 38 | 46 | 50 |
| 8,00% | 37 | 43 | 51 | 57 |

Útrokningarnar í talvuni eru bygdar á fortreytina um, at fólkatalið minkar 10%. Hóast hetta sæst, at nýtslugjaldið einans fer upp á 57 kr., tá kostnaðurin gerst 500 mió. kr. hægri enn væntað, og miðal rentan fyri tey komandi 30 árini verður 8%. Hetta seinna er rættiliga veruleikafjart, tí rentan í dag og 10 ár fram er væl lægri enn 8%. Og um ein eisini hevur í huga, at minst triðingurin av láninum er afturgoldin tá, verður rentuávirkanin á nýtslugjaldið tað minni.

Um ein byggikostnaður á 1.700 mió. kr. og ein renta á 8% eru dømi um mesta váðan, skal landið taka støðu til, hvørt tað vil átaka sær hendan ódekkaða váða og í næsta føri, um hesin váðin kann dekkast av øðrum. Við øðrum orðum skal støða takast til, um man kann og vil áseta nýtslugjaldið til 57 kr. Útrokningarnar vísa, at til ber at áseta nýtslugjaldið til 57 kr., uttan at hetta ávirkar ferðsluna stórvegis. *Niðurstøðan er tí tann, at landið átekur sær nærum ongan váða, sum ikki kann flytast beinleiðis yvir á brúkaran, uttan at hetta ávirkar nyttuna hjá honum nakað serligt.*

Talvurnar niðanfyri vísa ávirkanina á nýtslugjaldið, um fortreytirnar gerast uppaftur verri, enn tær vóru omanfyri. Hóast talan er um eina stagnastionsforsøgn, har fólkatalið minkar 10% við tilhoyrandi ferðslubroyting, verður afturat hesum løgd ein ferðsluminking omaná.

| Min. prísur við stagnatión og ferðsluminking | | | |
|---|---|---|---|
| 1.200 mió. kr. | -10% | -20% | -30% |
| 3,50% | 35,50 | 40,00 | 45,75 |
| 4,50% | 38,00 | 43,00 | 49,00 |
| 5,50% | 41,00 | 46,00 | 52,00 |

| Min. prísur við stagnatión og ferðsluminking | | | |
|---|---|---|---|
| 1.500 mió. kr. | -10% | -20% | -30% |
| 3,50% | 42,00 | 47,00 | 54,00 |
| 4,50% | 45,50 | 51,00 | 58,00 |
| 5,50% | 48,00 | 55,00 | 62,50 |

Talvurnar vísa, at hóast ferðslan minkar munandi, samstundis sum íløgan verður dýrari enn væntað, er at kalla eingin fíggjarligur váði tilstaðar fyri landið, sum ikki kann flytast til brúkarin, uttan at hesin verður ávirkaður av tí.

| Mest tolda ferðsluminking | | |
|---|---|---|
| Íløga (mió. kr.) | Minking | Ferðsla |
| 1.200 | -52% | 1.596 |
| 1.500 | -43% | 1.895 |
| 1.700 | -37% | 2.095 |
| r=5,5%, og stagnatiónsforsøgn, p=100 N/S | | |

Talvan omanfyri vísir, hvussu nógv ferðslan kann minka í mun til stagnatiónsforsøgnina, og at íløgan hóast hetta kann javnviga. Raðið uttast til høgru vísir, hvussu nógvir bilar koyra ígjøgnum um dagin. Til sammetingar kann nevnast, at tað í dag koyra umleið 3.600 bilar ígjøgnum Norðskálatunnilin.

Í øllum útrokningum higartil hevur sjóneykan verið vend ímóti teimum neiligu fíggjarváðunum. Arbeitt hevur bara verið við stagnatiónsforsøgnini. Tað er ikki rætt bert at hyggja eftir henni, tí hugsandi er eisini ein vakstrarforsøgn. Í næsta brotinum verður hetta umrøtt.

## Inntøkumøguleikar í verkætlanini

Ofta verða almennar verkætlanir íverksettar við tí endamáli at skapa stóra samfelagsnyttu. Tískil er ofta ókeypis ella sera lágt nýtslugjald á almennum verkætlanum. Ofta er rakstrarkostnaðurin so høgur, at nýtslugjaldið sjálvt ikki megnar at bera kostnaðin, og tí verður stuðul veittur. Meira sjáldsamt er tað, at ein almenn íløga hevur møguleika at kasta pening av sær gjøgnum nýtslugjaldið.

Nevnda verkætlan er av slíkum slagi, at um byggikostnaður og ferðsla verða sum mett, er gott pláss fyri at hækka nýtslugjaldið somikið, at íløgan gevur eitt avlop, uttan at hetta fer at nerva ferðsluna ella nyttuna.

Talvurnar niðanfyri vísa avlopið eftir 30 árum í ársins prísum við ymiskum nýtslugjøldum. Sum tað sæst, eru møguleikar fyri stórum inntøkum til felagið, ið kunnu brúkast til onnur endamál ella aðrar samferðsluútbyggingar, um vilji er til tað.

| Inntøkumøguleikar undir ymsum fortreytum | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Stagnationsforsøgn** | Avlop (mió. kr.) | | | |
| Nýtslugjald | 40 | 50 | 60 | 70 |
| Alment veðhald (3,5%) | 660 | 1.440 | 2.220 | 3.000 |
| Alment p/f (4,5%) | 474 | 1.254 | 2.034 | 2.813 |
| APS (5,5%) 50/50 ognarbýti | 288 | 1.068 | 1.848 | 2.627 |

| Inntøkumøguleikar undir ymsum fortreytum | | | |
|---|---|---|---|
| **Vakstrarforsøgn** | Avlop mió. kr. | | |
| Nýtslugjald | 40 | 50 | 75 |
| Alment veðhald (3,5%) | 1.522 | 2.252 | 4.083 |
| Alment p/f (4,5%) | 1.336 | 2.340 | 3.897 |
| APS (5,5%) 50/50 ognarbýti | 575 | 1.077 | 1.856 |

Um vakstrarforsøgnin verður brúkt og nýtslugjaldið ásett til  75 kr., fær tunnilin eitt avlop á góðar 4 mia. kr.  eftir 30 árum, sum kann vera við til at fíggja aðrar íløgur.

# Tíðarætlan

Niðanfyri er ein meting av tíðarætlanini.

## Forkanningar

P/F Skálafjarðartunnilin hevur tilfar, sum svarar til forkanningar til tunnilssambandið.

Geoteknisk analysa og rapport er gjørd, sum greiðir geologisku viðurskiftini á havbotninum, har linjuføringin er. Í hesum sambandi eru kjarnuboringar og seismiskar kanningar gjørdar í økinum.

Kostnaður í sambandi við hesar kanningar er ikki við í prísunum niðanfyri.

Væntandi kann hetta tilfar keypast frá gamla felagnum. Um nýggja felagið ikki velur at keypa hetta tilfar, men í staðin vil gera nýggjar kanningar, væntast hesar at kosta 4-5 mió. kr., umframt kjarnuboringar á 7,5 mió kr., íalt 12,5 mió. kr. Kanningarnar og nýggj frágreiðing kunnu fáast til vega innan 6-8 mánaðar.

## Projektering

Projekt skal gerast saman við neyðugari dokumentatión fyri trygd og tilbúgving. Hetta kann væntandi framleiðast uppá 1½ ár.

Projektið skal góðkennast av friðingarmyndugleikum, tilbúgvingarmyndugleikum og landsvegamyndugleika.

Væntandi kunnu hesar góðkenningar gerast innan 6 mánaðar.

## Keyp av jørð

Væntandi kann jørð til nýggjar vegir keypast innan 6 mánaðar.

## Bygging

Til ber at byrja verkætlanina við trimum holum samstundis. Eitt á Sundi, eitt á Strondum og eitt á Toftum.

Væntandi kann eitt borilið bora á leið 2 km. árliga. Alt bori- og spreingiarbeiði kann tí gerast upp á tvey ár. Síðani skal ljós, ventilatión og annar teknikkur monterast.

Byggitíðin væntast gjøgnumførd upp á 2½-3 ár.

| Tíðarætlan | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Forkanningar | | | | | | | |
| Projektering | | | | | | | |
| Mynduleikaviðgerð | | | | | | | |
| Keyp av jørð | | | | | | | |
| Bygging | | | | | | | |
| Upplating | | | | | | | |

Kelda: Landsverk.

## Niðurstøður

Grundað á arbeiðssetningin og tær settu fyritreytirnar, eru hesar niðurstøðurnar gjørdar í ritinum:

- Hildið verður, at skilabesta loysnin fyri samfelagið er, at Eysturoyartunnilin verður gjørdur í einum slagi av almennum partafelagi, sum vit kenna aftur frá Vága- og Norðoyatunlunum.

- Ein APS-loysn, har landið eigur eitt partafelag saman við øðrum partaeigarum hevði eisini borið til.

- Fyrimunirnir við einum almennum partafelagi eru m.a., at hetta er ein leistur, sum vit kenna áður frá hinum tunlunum, og at hetta kann gerast lutfalsliga skjótt og við góðum gjøgnumskygni.

- Til ber at fáa góða samfelagsnyttu úr verkætlanini, um tað almenna fær ávirkan á prísásetingina á nýtslugjaldinum.

- Viðbreknisgreiningar av verkætlanini vísa, at til ber at handfara váðan í verkætlanini. Til ber at hækka nýtslugjaldið, um t.d. verkætlanin verður óvæntað kostnaðarmikil, og uttan at hetta ávirkar samfelagsnyttuna av verkætlanini stórvegis

- Til ber eisini at fáa góðar rentutreytir, um landið veðheldur beinleiðis fyri skuldini hjá felagnum. Landsstýrið eigur at umhugsa at veðhalda beinleiðis fyri skuldina hjá einum tílíkum felagi, tí landið kortini ikki hevði kunnað latið eitt tílíkt felag farið á húsagang.

- Uttan eitt beinleiðis landskassaveðhald skal eitt tílíkt partafelag, sum fer undir verkætlanina, helst tola, at verkætlanin í ringasta føri verður 30-40% dýrari sammett við upprunaætlanir, uttan at øll eginognin hvørvur. Felagið skal tí helst hava 30-40% í eginogn frá byrjan.

- Fleiri hættir eru at minka um møguligu ávirkanina á kredittvirðið hjá landinum, sum eiga at verða umhugsaðir.

- Av tí at váðin er somikið avmarkaður og kann flytast á nýtslugjaldið, samstundis sum møguleiki er fyri munandi størri avlopi av verkætlanini, eigur APF loysnin at verða vald. Eydnast hetta ikki, ber í øðrum lagi til at fremja verkætlanina eftir einum APS-leisti. Men tá er neyðugt, at landið fær ávirkan á prísásetingina.

- Brúgvaloysnin gevur hægri nyttu og lægri íløgukostnað

## Tilmæli

Arbeiðsbólkurin mælir í fyrsta lagi til eina loysn eftir einum almennum P/F-leisti og ikki eitt APS, grundað á, at:

- Samfelagsnyttan er størri
- Brúkaratapið er minni
- Nýtslugjaldið verður lægri
- Landið eigur at umhugsa at seta trygd, hóast kredittvirðið møguliga versnar, tí landið vil kortini lofta verkætlanini 100% fyri ikki at missa kredittvirðið
- Landið fær eina betri lánsrentu við at stilla trygd
- Tað almenna verður mest sannlíkt fyri vanbýti, tí privati parturin letur partapeningin fara. T.v.s., at ósamsvar verður millum vinning og váða partanna millum.
- Skjótast at gjøgnumføra, tí:
- Eingin samráðingartilgongd er við aðrar partar
- Leisturin virkar, og landið hevur royndir við honum
- Líkareglan verður hildin við APF í mun til APS
- Rættvísiskenslan er meiri sannlík undir einum APF
- Gjøgnumskygnið er væntandi betri
- Kredittvirðið kann isolerað sæð betrast aftaná byggitíðina, tí landið fær ein øktan inntøkumøguleika
- Landið átekur sær ongan ódekkaðan váða
- Viðbreknisgreiningar vísa, at ætlanin er sera sterk fíggjarliga
- Endurskoða linjuføringina við atliti til at minka um íløguuphæddina og økja nyttuna.

Arbeiðsbólkurin mælirí øðrum lagi til at royna eina APS-loysn treytað av, at samfelagsnyttan verður tryggjað. Hetta kann gerast við:

- At landið fær avgerandi ávirkan á nýtslugjaldið
- Ávirkan á íløgukostnaðin
- Ávirkan á gjøgnumskygnið
- Ognarskapin
- At samsvar er við landsins langtíðar-infrakervisætlanir
- Hugsast skal um, hvussu tað almenna kann fáa aðrar íleggjarar úr felagnum í “ár 30”

## Framhaldandi viðgerð

Verður farið víðari við verkætlanini, verður neyðugt at fara undir neyvari tilrættarlegging og útgreining av verkætlanini. Hetta fevnir m.a. um at fáa greiði á hesum viðurskiftum:

- Gjaldførisætlan fyri byggitíðarskeiðið
- Forkanningar fyri at minka um váðan í smb. við byggingina
- Fáa greiðu á fyri hvønn kostnað byggifyritøkur kunnu fara undir tílíkar byggiverkætlanir, og hvørjar møguligar byggifyritøkur megna at loysa eina tílíka stóra uppgávu
- Kanna møguleikarnar fyri at læsa byggikostnaðin fastan frammanundan við ymiskum byggisáttmálum ella tryggingum
- Fáa greiðu á møguleikum fyri samanseting av eginogn og samanseting av eigaraskara
- Kanna møguleikarnar fyri fremmandafígging og treytirnar fyri lántøku, harundir møguligum landskassaveðhaldi
- Støða eigur eisini at verða tikin til, hvussu framtíðar prísásetingin á nýtslugjaldinum í øllum undirsjóvartunlunum skal vera. T.d. kann eitt felags nýtslugjald vera í øllum tunlunum, sum júst rindar fyri rakstur, viðlíkahald og enduríløgu, tá skuldin er afturgoldin.
- Stig, ið kunnu minka um ávirkanina á kredittvirðið hjá landinum, eiga at verða umhugsaði, áðrenn farið verður undir verkætlanina.
- Greiða eigur frammanundan at verða fingin á, hvussu eginpeningur ognarviðurskiftir skulu verða skipaði, tá skuldin er niður- og afturgoldin.

## Keldulisti

Hetta tilmælið við greiningum byggir á keldutilfar, ið frammanundan er til taks, umframt óformligar samrøður við fakfólk. Í eini víðari viðgerð við tí fyri eyga at røkka einum neyvari úrsliti, verður sjálvandi farið gjølligari til verka. Tó skal leggjast dentur á, at vit meta, at núverandi keldutilfar er nøktandi fyri góðskuna á hesum fyribils niðurstøðunum.

- Landsverk
- Fíggjarmálaráðið
- Fígging Landsins
- Bank Nordik
- Ferðsluframskriving Rambøll 2012
- Kostnyttu kanning Sund & Bælt 2013
- Notat frá Landsverki
- EIK Banki
- Grannskoðanarvirkið Januar